HAVNAR FYSIOTERAPI

## 2 størv í Havnar Fysioterapi (leigarar)

Søkt verður eftir tveimum fysioterapeutum, sum hava áhuga í at leiga hølir hjá Havnar Fysioterapi frá 1. januar 2008 ella seinni at rokna.

Ætlanin er, at annar fysioterapeuturin skal virka sum barnafysioterapeutur., t.v.s. at kanna og viðgerða børn við sansumotoriskum trupulleikum. Møguleiki er eisini fyri at arbeiða við øðrum sjúklingabólkum.

Ætlan okkara er, at hin fysioterapeuturin hevur kunnleika til/áhuga í m.a. MT, McKenzie og ítróttarfysioterapi.

Vit hava tvær viðgerðarstovur, eina í Vágoynni og hin í Tórshavn. Ætlanin er, at leigararnir skulu vera við í turnusskipan millum nevndu viðgerðarstovur, soleiðis at arbeitt verður hálvt ár 3 dagar í Tórshavn og 2 dagar í Miðvági, ella øvugt, og í eitt ár verður bert arbeitt í Tórshavn. Vit rinda ferðaútreiðslurnar millum viðgerðarstovurnar.

Vit reka eina nýmótans viðgerðastova við 8 fysioterapeutum og einum skrivara. Viðgerðarstovurnar eru vælinnrættaðar, hava góða venjingarútgerð og nýmótans telduskipan. Umframt arbeiði inni á viðgerðarstovunum, fáast vit nógv við heimaviðgerðir og arbeiði úti á arbeiðsplássum.

Fyri alsamt at hava eitt høgt fakligt støði, hava vit regluligar fakligar fundir og vit lata fíggjarligan stuðul til eftirútbúgving.

Umsøkn, saman við prógvi og cv, skal sendast til Havnar Fysioterapi, postboks 232, 110 Tórshavn ella til t-post fysioterapi@fysioterapi.fo og viðmerkjast »Umsókn«. Umsóknarfreistin er 18. desember 2007.

Um hetta hevur tín áhuga, og um tú ynskir at frætta meira, so set teg í samband við okkum.

**Havnar Fysioterapi**
**Tinghúsvegur 72**
**100 Tórshavn**
**Tlf. 312131**
**Eftir arbeiðstíð : Klæmint Isaksen 219657**
**ella Hjørleif Niclasen 218807**
**T-postur : fysioterapi@fysioterapi.fo**
**Heimasíða : www.fysioterapi.fo**

## Sertannlæknastovan

Søkt verður eftir klinikkassistenti / starvsfólki til móttøkuna á Sertannlæknastovuni at byrja eftir nýggjár 2008.

Starvið er tó rættiliga fjølbroytt, arbeiðstíðin er í meðal 33 tímar um vikuna, og lønin samsvarar við sáttmálan hjá Starvsmannafelagnum á hesum øki.

Av førleika krevst útbúgving við starvsroyndum á tannlæknastovu ella í heilsuverkinum, umframt kunnleiki til arbeiðið við teldu.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til tlf. 311510, 211510 ella á teldubústaðnum, sí niðanfyri.

**Skrivlig umsókn kann innan 10. des. sendast til:**
Bergtóru Hanusardóttur,
Tinghúsvegur 53, Tórshavn
við telduposti til: bergtora@post.olivant.fo
ella til faxnr. 316526

## AÐALFUNDUR

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya verður **leygardagin 1. mars 2008 kl. 10.00** í FSF-húsinum.

Fundarskrá sambært lógunum.

Fótbóltssamband Føroya

www.fsf.fo

TVØROYRAR KOMMUNA

## Til foreldur at børnum í skúlunum í Tvøroyrar kommunu

Ársfundurin verður í skúlahøllini í Trongisvági týskvøldið 4. des kl. 19.

Evni er happing. Ólavur Rasmussen leggur fyri. Orðaskifti aftaná.

**Skúlastýrið**

## KOYRIKORT? EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 3. desember 2007 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |




EYSTUROYAR TEORISKÚLI

## Bilførari søkist

Bilførari við trailarakoyrikorti søkist.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Sp/f OCD**
Heiðavegur 81 · FO-600 Saltangará
Tel. 477200

## Runavíkar Kommuna søkir eftir

## Pedagogum til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
- 1 pedagogi 30t um vikuna, til barnagarðsstovu við 6-ára gomlum børnum
- 1 pedagogi 30t um vikuna, til barnagarðsstovu við 3 – 5 ára gomlum børnum
- 1 pedagogi 35t um vikuna, til stovuna við børnum við serligum tørvi

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Starvið á serstovuni verður sett 1. januar 2008 og størvini á barnagarðsstovunum verða sett 1. februar 2008 ella eftir nærri avtalu. Pedagogar, sum verða lidnir í februar mánaði 2008, eru eisini vælkomnir at søkja. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14 desember 2007, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-610 Saltangará

Í Barnagarðinum á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur, 1 barnagarðsstova við 6-ára gomlum børnum og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

## *FØROYA HEIMAVIRKISFELAG*

**Atgongumerkini, sum vunnu gávukort á Jólasøluni í Ítróttarhøllini á Hálsi, vóru hesi:**

Nr. 280 gávukort á kr. 500,-
Nr. 1094 gávukort á kr. 500,-
Nr. 1103 gávukort á kr. 500,-
Nr. 424 gávukort á kr. 300,-
Nr. 1398 gávukort á kr. 300,-
Nr. 1742 gávukort á kr. 300,-

**Gávukortini kunnu heintast í handlinum Tina Mik, Niels Finsensgøta 35, Tórshavn**